

# FØÐINGAR

11. juli fingu Jónleyg B. Johannesen, Sandi, og Ivan Jensen, Norðskála, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4310 gr.

12. juli fingu Hertha Jóanesarson og Martin Kúrberg, Eiði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3150 gr.

12. juli fingu Julianna og Ingolvur Foldbo, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4000 gr.

13. juli fingu Jóhanna og Jens Meinhard Rasmussen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3750 gr.

14. juli fingu Sunniva Østerø, Hoyvík, og Jan L. Rasmussen, Strendur, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3505 gr.

14. juli fingu Durita Samuelsen og Petur Mohr Dam, Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3720 gr.

15. juli fingu Jenny Jacobsen og Heri Guttesen, Bø, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3100 gr.

15. juli fingu Oddvør og John Martin Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4400 gr.

16. juli fingu Oluffa Undir Kletti og Kristmund Steinkross, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2510 gr.

17. juli fingu Ann J. og Jákup Djurhuus, Saltangar-á, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3850 gr.

19. juli fingu Hanne-mi og Hans Johannes á Brúgv, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3450 gr.

19. juli fingu Poula og René Hansen, Nólsoy, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

19. juli fingu Beinta og Regin Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

20. juli fingu Gunnleyg og Jón Nolsøe Olsen, Kambsdali, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4500 gr.

# ANDLÁT

12. juli
**Ása Margretha Poulsen**, ættað úr Mikladali, búsitandi í Keypmannahavn, 74 ár.
**Leivur Joensen**, vanliga nevndur Leivur hjá Gøtu Pola, í Klaksvík, 75 ár.

13. juli
**Maria Tokehøj**, fødd Vang, ættað úr Kvívík, búsitandi í Keypmannahavn, 92.

14. juli
**Julia Joensen**, av Trøllanesi, 78 ár.

15. juli
**Jensina Niclasen**, fødd Thomsen, ættað úr Nes-Hvalba, búsitandi í Havn, 75 ár.
**Jóhan Jacob Hansen**, í Syðrugøtu, 88 ár.

17. juli
**Torbjørn Olafson Reinert**, í Tórshavn, 60 ár.
**Karl Danielsen**, í Saltangará, 94 ár.
**Hanna Olsen**, í Hósvík, 88 ár.
**Jóan Petur Thomsen** í Froðba, 54 ár.
**Karna Jancy Debes**, búsitandi í Skopun, 58 ár.
**Jóan Jacob í Gerði**, ættaður av Skipanesi, búsitandi í Tórshavn, 70 ár.

18. juli
**Tobias Askildsen** í Tórshavn, 71 ár.

19. juli
**Derhard Olsen**, Rituvík, 86 ár.

# KIRKJUR & SAMKOMUR

## 5. sunnudagur eftir Trinitatis

*Havnar kirkja:* Sonja Klein kl. 11. Talvan gongur fyri Hina føroysku Sjómansmissiónina
*Vesturkirkjan:* Heri Joensen kl. 11
*Nólsoy:* Elsa Funding kl. 12
*Vestmanna:* Prestainnseting kl. 11. Bjarni Bæk innsetir Ingu Poulsen Dam
*Mikladalur:* Niels Pauli Danielsen kl. 12, altargongd
*Eiðis prestagjald:* Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Fuglafjarðar prestagjald:* Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Noroya vestara prestagjald:* Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Oyndarfjarðar, Sjóvar og Selatraðar kirkja:* Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Vága prestagjald:* Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Sandvík:* Ólavur Rasmussen kl. 11
*Hvalba:* Ólavur Rasmussen kl. 12
*Porkeri:* P. M. Rasmussen kl. 11
*Sumba:* P. M. Rasmussen kl. 18
*Gøtu kirkja:* Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Glyvrar:* Uni Næs
*Viðareiði:* Meinhard Bjartalíð kl. 11
*Christianskirkjan:* Hans Eiler Hammer kl. 11

## Ebenezer
Sunnudagin kl. 18: Evangeliskt møti. Sunnukvøldið kl. 21: Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20: Ungdómsmøti.

## Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 17 landsbøn. Í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 møti. Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20 bønarskúli.

## Rhema á Hálsi
Onki møti verður sunnudagin.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 06. Øll eru vælkomin.

## Frelsunarherurin, Tórshavn
Í dag kl. 11: Útimøti.
Sunnudagin kl. 11 møti og kl. 18 møti.

## Meinigheitshúsið í Havn
Sunnukvøldið kl. 18: Møti v/ Jónsvein og Meiken Joensen.
Týskvøldið kl. 20: Bíbliutími v/ Jacobinu Hansson. Evni: Børn og foreldur í Bíbliuni.

## Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Jónfinn og Bjartu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Saron, Vestmanna
Sunnudagin møti kl. 18. Mánakvøldið bønarmøti kl. 20.

## Missiónshúsið í Skopun
Onki møti sunnudagin vegna Oyggjarstevnu í Húsavík.

## Frá 1000 ára haldinum
Sunnudagin 23. juli kl. 17.00 heldur Hanus A. Samuelsen fyrilestur um halgidagasiðir í Bygdarhúsinum á Húsum.
Niels Midjord, Petur J. Eliasen og Hans J. Hansen úr Fuglafirði syngja sjósálmar, soleiðis sum Marius Vilhelmsen á Syðradali K. sang teir.

## Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Finni Hansen, sum talar og syngur.
Týskvøldið kl. 20 húsmøti hjá Anthony & Charles Johansen, Saltangará.
Hóskvøldið kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun & fríggjamorgun frá kl. 6-7.

## Keldan í Skálafirði
Í kvøld kl. 21: Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 19: Møti við Egil Toftegaard.

## Missiónshúsið í Oyndarfirði
Møti verður sunnudagin kl. 17 v/ John S. Myllhamar, trúb. Innsavning til missiónsarbeiðið.

## Missiónshúsið á Strondum
Møti verður sunnukvøldið kl. 19 v/ John S. Myllhamar, trúb.

## Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 v/ Katrin og Kjarstein. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Betel, Vágur
Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11.00. Evangeliskur fundur kl. 18.00. Útifundur kl. 21.00.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.00
Ónsdagin: Uppbyggingarfundur kl. 20.00.

## Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Frá 3. juli til 14. august er opið mánadag–fríggjadag kl. 14–18.
Framsýningar á Ólavsøku 28.–30. juli kl. 14–18.
Á miðhæddini í Tilhaldinum er ein framsýning við tekningum úr realskúlanum í Havn, tekningar sum næmingar hjá J. M. Kjeld lærara uml. 1953-1960 hava teknað og í kjallaranum er ein skúlamyndaframsýning við gl. myndum úr skúlanum í Havn.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

## AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundir verða í dag kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12 og evnisfundur kl. 20-21.30.

## Al-Anon fundir í Havn
Fundir eru hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21.00 á Vaskarínum.

## AA-fundir í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla lærarabúðin).

## Vága Gongufelag
Um viðrar ger Gongufelagið túr norð á Slættanes 23. juli kl. 10. Byrjað verður norðuri á Hálsi. Havið matpakka og góð gonguklæði við. Tilmelding neyðug. Tlf. 333455, 213455, 333200.

## Reyði Krossur Føroya
Bjargingarkransar-bólkurin fund leygardagin 22. juli. Nærri á tlf.svarara 319630. Samaritar og 1. hjálparar fund mikudagin 26. juli kl. 19.30.
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

# Eitt ljós á gøtu míni



## Happan

***Rómv.br. 8,31:***
*Er Guð við okkum, hvør er tá ímót okkum?*

Við ella ímót? er ein spurningur, sum vit fáa longu í barnaárunum. Oftast er ikki lukkuligt at vera ímót, tá ið tann sterkari ella meirilutin hevur talað. Tá byrjar happingin.

Lívið er eitt spæl og eitt stríð. Í spælinum og uppalingini búnast vit og mennast til at taka støðu, tá ið avbjóðingarnar koma og seinni at stríðast ímót, har tað eigur at verða gjørt og eisini duga at taka ein ósigur.

Men vit verða í hesum døgum mint á, at tað eru tey, sum altíð tapa, líkamikið um tey eru eins væl útgjørd sum onnur til at taka á seg tey krøv, lívið setir einum. Tað er bara tað, at tey eru øðrvísi enn hini, sum eru nóg sterk til at seta reglur. Eina tíð vóru tað tey fátæku, sum vórðu kúgað og enn sleppa tey ikki nóg væl upp í part, eina aðra tíð tey littu, og nú stendur stríðið um tey samkyndu.

Fyri hálvthundrað árum síðan vistu fólk í Havn væl, at nøkur teirra millum vóru soleiðis, at tey ikki kundu hava tað, vit kalla natúrligt samlív; men tey fingu frið, eingin talaði um tað ella válkaði sær í tí. Nú afturímóti er tað komið soleiðis fyri, at ein næstan er tvungin til at siga sína hugsan antin við ella ímót.

Paulus hevur í kap. undan hesum í Rómv.br. víst, at tann, ið trýr á Jesus »skal liva«. Tær illu makirnar, vísir hann á, missa ein fyr og onnur eftir sítt harravald.

Tí Guð spardi ikki sín son, men gav hann upp fyri okkum øll, hví skuldi hann ikki geva okkum alt við honum. Hvør vil ásaka Guðs útvaldu? Øll, sum eru doypt, eru Guðs børn. Okkum dámar eisini at tala um okkum sum Guðs skapningar, og í trúnni á Jesus eru vit útvald uttan mun til, um ein er svartur ella hvítur, ríkur ella fátækur, samkyndur ella ikki.

Tí sum apostulin heldur fram: Hvør skal skilja okkum frá kærleika Krists! Trongd? Ella angist? Ella atsókn? …

Nei, einki av tí, sum hann roknar upp skal kunna skilja okkum frá kærleika Guðs í Kristi Jesusi, Harra okkara.

Soleiðis bar Jesus okkum eisini gleðiboðskapin.

*kj.m.*

# Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 22. juli:*
Tormóður Stórá, tlf. 441086
*Sunnudagin 23. juli:*
Magnus á Stongum, tlf. 423006

**Norðoyggjar:**
*Leygardagin 22. og sunnudagin 23. juli:*
Jaspur Petersen, tlf. 456400

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

## Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.